**Sirið Stenberg**
**Høgni Hoydal**
**Beinta Løwe Jacobsen**
**Páll á Reynatúgvu**
**Bjørt Samuelsen**
**Hervør Pálsdóttir**
**vegna Tjóðveldi**

Løgtingið

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti**
(Hækkan av inntøkumarki og stuðli)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020 og § 10 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk. 1 verður “220.000 kr.” broytt til: “227.000 kr.” og “24.000 kr.” broytt til: “30.000 kr.”

**2.** Í § 2, stk. 3 verður “320.000 kr.” broytt til: “330.000 kr.” og “24.000 kr.” broytt til: “30.000 kr.”

**3.** Í § 3, stk. 1 verður tvær staðni “220.000 kr.” broytt til: “227.000 kr.”

**4.** Í § 3, stk. 2 verður tvær staðni “320.000 kr.” broytt til: “330.000 kr.”

**5.** Í § 3 a, stk. 1 verður “220.001 kr.” broytt til: “227.001 kr.”

**6.** Í § 3 a, stk. 2 verður “220.000 kr.” broytt til: “227.000 kr.”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar**
Ein hin fremsta uppgávan í einum samfelag er at tryggja, at fólk hava góð og trygg lívskor. Í einum so ríkum samfelag sum Føroyum eigur tí alt at verða gjørt fyri, at fólk ikki liva í fátækt ella vána korum.

Fyri at bøta um korini hjá familjum í fátækt varð familjuískoytið sett í verk við ársenda í 2015. Um familjuískoytið stendur soleiðis í lógini: Familjuískoyti verður veitt støkum, hjúnum og samlivandi umframt fosturforeldrum, sum sambært skráseting í Landsfólkayvirlitinum hava heimabúgvandi børn undir 18 ár. Um barnið fyribils uppiheldur sær uttan fyri heimið í útbúgvingarørindum í upp til eitt ár, verður sæð burtur frá treytini um, at barnið skal vera heimabúgvandi. Ískoytið er tongt at inntøku og ogn.

Familjuískoytið er 24.000 kr. um árið til stakar uppihaldarar, hjún og samlivandi, ið hava eitt barn búgvandi. Fyri hvørt barnið aftan á tað fyrsta hækkar ískoytið við 6.000 kr.

Støðan í samfelagnum nú er heilt serstøk. Prísvøksturin er søguliga høgur. Serliga er tað oljukostnaðurin og gerandisvørur, sum er dýrkað so mikið, at tað í mongum familjum er sera trupult at fáa endarnar at røkka saman. Tað er eyðsæð, at barnafamiljur og fólk við lágari inntøku eru serliga hart sperd, nú kostnaðarstøðið er søguliga hækkað. Gerandisvørur, matur, klæði og líknandi eru dýrkað søguliga nógv, og lønirnar hava ikki fylgt við. Fleiri og fleiri leita sær hjálp hjá felagsskapum til mat og klæðir, og fleiri fólk gera alment vart við truplu fíggjarstøðuna, sum rakar teirra familjur.

Trupul fíggjarlig kor og fátækt rakar sera hart. Tað rakar gerandisdagin, og serliga børnini líða undir hesum. Frá kanningum vita vit, at hetta gongur útyvir bæði heilsu og trivnað, ikki bara í barnaárum, men eisini inn í vaksnamannalívið. Tað kann gerast ein sosialur arvur fyri barnið, sum tað ber við sær í vaksnamannalívið. Sostatt raka trupul fíggjarlig kor og fátækt ikki bara her og nú, men er nakað, sum kann fylgja við yvir ættarlið.

Tí má lógin um familjuískoyti broytast sum ein liður í at hjálpa hesum sperdu familjum. Endamálið við uppskotinum er, at bæði upphæddin, sum fólk kunnu fáa sum ískoyti eins og inntøkumarkið hækkar, soleiðis at skipanin røkkur út til fleiri borgarar, samstundis sum fíggjarliga ískoytið munar betur í gerandisdegnum hjá teimum, ið hava trupult at fáa endarnar at røkka saman. Ítøkiliga hækkar ískoytið við 6.000 kr., og inntøkumarkið fyri stakar uppihaldarar og hjún/samlivandi hækkar til á leið 90% av eini arbeiðaraløn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar, men mælt verður til, at t.d. Almannaverkið verður hoyrt undir tingviðgerðini.

**Avleiðingarnar av uppskotinum**
Síðan familjuískoyti bleiv sett í verk eru brúktar á leið 10 mió. kr. til skipanina árliga. Á fíggjarlógini sær tað soleiðis út:

2019 – 10.170 kr.
2020 – 10.797 kr.
2021 – 10.760 kr.
2022 – 10.560 kr.

Somuleiðis er upplýst á heimasíðuni hjá Almannaverkinum, at 495 veitingar eru latnar av kontuni fyri familjuískoyti.

Uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan. Skipanin við familjuískoyti er tongd at inntøku hjá foreldrum/uppihaldarum og tali av børnum í húskinum, og harvið fáa øll ikki somu upphædd útgoldna. Hetta ger tað trupult at meta um, hvørjar tær ítøkiligu fíggjarligu avleiðingarnar av hesum lógaruppskoti fara at verða, men verður bara hugt at hækkingini í ískoytinum á kr. 6.000 árliga, so hevði hetta viðført eina meirútreiðslu á á leið 3 mió. kr. árliga. Útreiðslan verður tó lægri við tað, at ískoytið í fleiri førum er lægri orsakað av inntøku og tali av børnum í húskinum.

Útreiðslurnar av uppskotinum verða fíggjaðar við broyting í fíggjarlógini fyri 2023.

Uppskotið hevur ikki við sær stórvegis umsitingarligar útreiðslur fyri landið við tað, at skipanin longu er í gildi. Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum, ið seinni vísa seg at gerast neyðugar, bæði í hesum og øðrum lógaruppskotum orsakað av teimum lógarbroytingum, ið eru gjørdar í hesum uppskoti.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Inntøkugrundarlagið á 220.000 kr. fyri stakar uppihaldarar og 320.000 kr. fyri gift ella samlivandi verður hækkað til ávikavist 227.000 kr. og 330.000 kr.

Familjuískoytið á 24.000 kr. verður hækkað til 30.000 kr. fyri fyrsta barnið.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting.

**Á Løgtingi, 19. oktober 2022**

| | | |
|---|---|---|
| Høgni Hoydal | Sirið Stenberg | Beinta Løwe Jacobsen |
| Páll á Reynatúgvu | Bjørt Samuelsen | Hervør Pálsdóttir |